HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

fylgiskjál 14

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
FO – 100 Tórshavn
himr@himr.fo

Tórshavn, hin 28. mai 2018
Málnr.: 18/00439-5
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri:

**Aliumsitingin og Veterinerdeildin**

**Hoyringsskriv**
Heilsufrøðiliga starvsstovan takkar fyri møguleikan, at gera hoyringsskriv til uppskot til náttúrumargfeldislógina.
Niðanfyri eru fyrst tær almennu viðmerkingarnar frá veterinerdeildini, og síðani frá aliumsitingini. At enda eru viðmerkingar frá veterinerdeildini til tær serligu viðmerkingarnar.

**Almennar viðmerkingar – Veterinerdeildin**
Heilsufrøðiliga starvsstovan fegnast um, at arbeiði við náttúrumargfeldislógini er so langt ávegis. Stórur tørvur er á slíkari lóggávu í Føroyum, sum varar av ríkidóminum, ið her finst.

*Viðvíkjandi innflutningi og flutningi av djórum*
Sum skilst, skal landsstýrismaðurin, sum varar av náttúrumargfeldislógini, loyva øllum innflutningi av lívverum til Føroya. Undantikið er tó, at Heilsufrøðiliga starvsstovan skal loyva innflutningi, sbrt. løgtingslóg um innflutningi og hald av vandamiklum djórum o.ø., og kunngerð um innflutning av eksotiskum dýrum.
Heilsufrøðiliga starvsstovan vil staðiliga mæla frá, at landstýrismaðurin, sum varar av náttúrumargfeldislógini, ferð inn um geiran hjá landsdjóralæknanum, hægsta veterinera myndugleikanum, tá ið tað snýr seg um innflutning av djórum til Føroya og flutning av djórum í Føroyum.

Ein av høvuðsuppgávunum hjá landsdjóralæknanum, sum hægsti veterineri myndugleiki, er at fyribyrgja fremmandum sjúkum í at koma og festa sær fót í Føroyum. Hetta kann verða til vanda fyri føroyska djóralívið, og í ringasta føri, sum ein avleiðing av hesum fyri djóramargfeldið. Fyri nettupp at lúka krøvini í hesi veterineri uppgávu, eru longu nú kunngerðir, ið regulera økið viðvíkjandi innflutningi og flutningi av djórum:
- Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum.
- Kunngerð nr. 52 frá 31. mai 2007 um samhandil við og innflutning av hóvdjórum úr triðjalondum
- Kunngerð nr. 14 frá 7. apríl 2004 um innflutning av eksotiskum dýrum
- Løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- Løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur
- Kunngerð nr. 51 frá 31. mai 2007 um vernd av djórum undir flutningi
- Kunngerð nr. 3 frá 14. januar 2003 um forboð móti flutningi av livandi kleyvdýrum oygjanna millum v.m.

Eitt av høvuðsendamálinum í náttúrumargfeldislógini, sbrt. § 1 er at røkja tað lívfrøðiliga margfeldið. Mett verður í hesum sambandi at djórasjúkur mugu og

Smyrilsvegur 7, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http://www.hfs.fo

skulu hava avgerðandi tyngd. Hetta orsaka av, at um fremmandar sjúkur koma til landið, kann tað lívfrøðiliga margfeldið skjótt verða í vanda. Tí er tað sera umráðandi at djórasjúkulógin og kunngerðir við heimild í henni verða brúktar í metingini, tá loyvi um innflutning av djórum verða givin. Lógir og kunngerðir sum landsdjóralæknin umsitur og fyrisitur.
Djórasjúkulógin skal tí í einari lógarkonflikt í hesum sambandi hava størstu tyngdina.

Av tíð at umráðið um innflutning og flutning av djórum longu er væl regulerað, er ongin grund til at hetta eisini verður regulerað í náttúrumargfeldislógini. Tó so, um tað lívfrøðiliga margfeldið er fyri váða á einum øki, kann landsstýrismaðurin, sum varar av náttúrumargfeldislógini, fáa samstarv í lag við landsdjórlæknan um innflutningsloyvi ella flutningsloyvi til tað ítøkiliga djórið og staðið talan kann verða um.
Kortini er tað gott at náttúrumargfeldislógin regulerar, røkir og hevur umsjón við plantum og djórum, ið longu eru komin til Føroya og eisini teimum, sum ótilætlað kunnu koma til Føroya í framtíðini.

*Mold, plantur og mold*
Eitt umráði, ið hevur stóran tørv á regulering, og sum ikki sæst aftur í lógini, er innflutningur av mold og innflutningur av plantum við mold. Hendan moldin kann hava uppiíhangandi smáverur/kykt, ið kunnu koma at gera skaða á margfeldið í Føroyum. Dømi um óhepnar avleiðingar av ótilætlaðum innflutningi, sum kunnu nevnast eru, flatmaðkurin, morsniglin, vespan og skøran.
Mælt verður til, at hesin geirin eisini verður tikin við í náttúrumargfeldislógina.

*Málburður*
Sum heild verður mett, at lógin ber í og so tung spor eftir av at verða umsett beinleiðis úr norskum. Hetta ger at lógin og viðmerkingarnar verða óneyðuga tungar og torskildar. Tá ið faklig heiti, sum vanliga ikki verða brúkt millum manna, verða brúkt, verður mælt til at internationalu orðini standa í klombrum. Ynskiligt hevði eisini verið við fleiri allýsingum.

Harumframt verður mælt til, at umhugsa orðið/heiti "dýr" og "djór". Antin skal orðið dýr brúkast allastaðni ella skal orðið djór brúkast allastaðni. Viðmerkjast skal eisini, at t.d. orðið djóralækni er tað orðið, sum verður brúkt millum manna. Í einari talgildari leiting í lógini og samsvarandi lógum og kunngerðum, kann tað órógva at fleiri orð verða brúkt um sama heitið.

Viðmælt verður harumframt, at tað gjøgnumgangandi verða brúkt fleiri dømir til frágreiðingarnar í viðmerkingunum.

**Samanumtikið**
**Tað er tørvur á eini lóg sum náttúrumargfeldislógini í Føroym. Yvirhøvur kann takast undir við lógini, men vandi kann verða fyri at hon verður tung at umsita.**
**Náttúrumargfeldislógin skal tó ikki fara inn um geiran hjá landsdjóralæknanum, og viðgera loyvi um innflutning av djórum til Føroya ella flutning av djórum í Føroyum. Hetta økið er longu væl vart av lógum og kunngerðum.**

**Viðmerkingar til uppskot til náttúrumargfeldislóg - Aliumsitingin**
Eftir §§ 4-14, verður heimild til at gera árinsmetingar. Leingi hava tílikar árinsmetingar verið eftirspurdar í alingini í Føroyum. Í sambandi við at alilógin fyri stuttari tíð síðani var broytt, verður víst til s. 21 í broytingaruppskotinum, har tað stendur, at tað er umhvørvismyndugleikin, sum tekur avgerðir, sum innihalda metingar av atlitum at umhvørvi. Aliumsitingin metir ikki, at tað sæst heilt greitt, hvør myndugleiki skal umsita árinsmetingar eftir ásetingunum í kap. 2.

Aliumsitingin sær heldur ikki nakra heimild í lógaruppskotinum til náttúrumargfeldislógina til at krevja kanningar gjørdar, m.a. av loyvishavara í alingini. Tað tykist sum, at árinsmetingarnar einans skulu fevna um ta vitan, sum er tøk, tá avgerðin skal takast. Ynski hevur verið um at kunnu krevja kanningar av møguligum árinum frá alingini frá loyvishavaranum (alaranum).

Spurningurin er eisini, hvør ber kostnaðin av árinsmetingunum. Í sambandi við alingina, hevur ætlanin verið, at loyvishavarin (alarin) skal bera kostnaðin av hesum, men eftir lógaruppskotinum, ber loyvishavarin einans kostnaðin av virksemi, sum forðar fyri ella avmarkar skaða á umhvørvið, sí orðingina í § 11.

Viðvíkjandi § 26 í lógaruppskotinum, er trupult at síggja, um alingin er fevnd av ásetingini. Er alingin fevnd av § 26, stk. 1, so sær tað út til at vera heimild fyri at krevja árinsmetingar í sambandi við innflutning av verum til aling eftir § 26, stk. 2. Er alingin ikki fevnd av ásetingini, sær tað ikki út til at árinsmetingar er ein møguleiki. Tað er torført at síggja um tað er ein samanhangur millum ásetingina í § 26 og ásetingarnar í kap. 2, ella um hetta verður umsitið hvør sær.

Eftir § 27, stk. 1, nr. 3 er ikki neyðugt við loyvi til útsetu eftir náttúrumargfeldislógini, tá loyvi er givið eftir alilógini. Ásetingin nevnir einans sjógv, áir, vøtn, ósar, løkir og manngjørdar hyljar. Víst verður á, at nógv aling eisini fer fram á landi, harundir m.a. smoltstøðum og lívfiskastøðum, og eigur hetta eisini at vera fevnt av ásetingini.

§ 36 ásetur, at økir kunnu friðast (verndarøkir) í og á sjónum. Fakliga nevndin, sum verður sett á stovn í staðin fyri friðingarnevndirnar, má bara hoyrast, men hvør tekur endaligu avgerðina – og hvat um konflikt er millum friðing og aling ?

Í løtuni er tað soleiðis at alifirðir framganga av fylgiskjal 1 í kunngerð nr. 134 frá 16. oktober 2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 176 frá 29. desember 2017. Kemur konflikt millum t.d. fylgiskjal 1 og friðing, so má onkur avgerða tað. Tað má framganga hvør tekur avgerðina og hvørt hon kann kærast.

**Serligar viðmerkingar - Veterinerdeildin**

*Til § 3 nr. 10*
Tari kundi eisini at verði nevndur, so einki ivamál er.

*Til § 3 nr.15*
"útseting" verður vanliga skilt sum: At sleppa lívveru út í náttúruna, við tí endamáli at lívveran skal liva vill/vilt. Henda allýsingin átti ístaðin at verið, "útslepping", sbr. k.14/2004 (kunngerð um innfluting av eksotiskum dýrum, § 3 stk. 2).

*Til § 3 nr. 18*
"Vistfrøðiligur standur": Sera torskild allýsing.

*Til § 5*
"Miðast skal eftir at varðveita sløgini": Hvussu við sníkum, t.d. laksalús, førlús, lundalús og øðrum sníkum? Spurningur er, um hesi sløgini kunnu koma undir allýsingina "fremmandar lívverur" sbrt.§ 3 nr. 2. Um tær ikki kunnu koma undir hesa allýsingina, eru tær fevndar av § 5 stk. 1, og skulu tær tí varðveitast?

*Til § 17 nr. 6*
Sambært serligu viðmerkingunum er eitt nr. 7 eisini.

*Til § 17 stk. 2*
Skal broytast nr. 1-5

*Til § 23*
Hædd skal takast fyri lógum og kunngerðum nevndar í almennu viðmerkingum:

- Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum.
- Kunngerð nr. 52 frá 31. mai 2007 um samhandil við og innflutning av hóvdjórum úr triðjalondum
- Kunngerð nr. 14 frá 7. apríl 2004 um innflutning av eksotiskum dýrum
- Løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- Løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um **djórasjúkur**
- Kunngerð nr. 51 frá 31. mai 2007 um vernd av djórum undir flutningi
- Kunngerð nr. 3 frá 14. januar 2003 um forboð móti flutningi av livandi kleyvdýrum oygjanna millum v.m

*Til § 24*
Hædd skal takast fyri djórasjúkulógini.

*Til § 26*
"Livandi ella lívførar lívverur": Eigur "rein" mold og mold við plantum ikki eisini at verða fevnd av hesi greinini? Sleppast skal undan fremmandum lívverum í moldini, t.d flatmaðki, eiturkoppum, sniglum, vespum, meyrum, humlum, o.ø. Sí almennar viðmerkingar.

*Til § 27 stk. 3, 4. pkt.*
Hædd skal eisini takast fyri djórasjúkulógini og kunngerðum við heimild í djórasjúkulógini.

*Til § 29 stk. 1*
Hendan grein eigur bert at viðvíkja loyvum til innflutning og útseting av mold og plantum. Landsdjóralæknin, umsitur og fyrisitur longu innflutning og útseting av djórum.

*Til § 29 stk. 2*
Fyri at varðveita margfeldið mugu atlit eisini takast til lív og heilsu hjá djórum og plantum, sbr. djórusjúkulógina og Lov nr. 370 af 21. December 1938 for Færøerne om Bekæmpelse af smitsomme Plantesygdomme og Skadedyr.

*Til § 63 stk. 4*
" Avlíva fremmandar lívverur ": Eigur at verða "týning av fremmandum lívverum". Á hendan hátt verða planturnar eisini fevndar av hesari grein.

**Viðmerkingar til viðmerkingarnar**

*s. 36 um §§ 18 og 19 um tøku av ávikavist ryggleysum dýrum og plantum*

**"sjálvum skaðadýrum"**: Her eigur eisini at viðmerkjast og "skaðaplantum"

*s. 38 Lógarkapittul 4 um Fremmandar lívverur (§§ 25-29)*

*í partinum "Umhvørvisligar avleiðingar":* "útflutning (§ 27)": skal verða um útseting og sølu.

*s.51:*
"Tað er ikki eitt høvuðsendamál við lógini, at røkja ílegumargfeldið innan fyri húsdýrasløg og kynbøtt plantusløg": Er hetta ikki í andsøgn við § 5 stk. 3. Sí viðmerkingarnar hertil. Stk. 3 ásetur eitt fyrisitingarmið fyri ílegumergfeldi innanfyri tamd og vand sløg

*s. 53 nr. 2*
"ílegumargfeldið innan fyri eitt slag": Dømi?

"Ein lívvera er fremmand, tá hon er komin um landamark.....": Eru lívverurnar eisini fremmandar, tá ið tær koma sjálvar. T.d. fuglur?

"Føroya tey seinnu árini": Hvussu langt aftur ganga, tey seinnu árini?

"heilt nógvum árum": Hvussu nógv er tað. Hóast tað kann verða trupult, at seta eitt fast áramál, kann tað verða neyðugt. Hetta serliga, tá talan er um skaðadjór og skaðaplantur.

"Nær ið eitt innsløtt slag ikki longur skal verða at rokna sum fremmant": Hvat við "varsemisskylduni? Er tað í lagið, at eg sum havaeigari, seti plantur niður, sum so seinni vísa seg at

spjaða seg ókontrollerað. Eru hesar plantur, tá vorðnar ikki-fremmandar? Hetta kann verða ein trupulleiki viðv. djórum. Djór í dag, sum eru at roknað sum eksotisk, men sum so kanska seinni verða til føroysk. T.d. rotta (rotta er vanligt kelidjór í summum øðrum londum)

*s. 53 nr. 4:*
"Tað er eisini at rokna sum innflutningur": Tað er innflutningur. Ikki eisini innflutningur.

*s. 54 nr. 8*
"Heilt tamt og vant lívfrøðiligt margfeldi, t.d. húsdýrasløg ella røktarplantusløg, fellur uttan fyri allýsingina:" Hvørji djór og plantur verður hugsað um her. Hvat er "heilt tamt og vant"?
Her vænta dømir. Hvat eru tamd og vand djór. Hvat er heilt tom djór. Og hvussu verða planturnar fevndar av at verða tamdar og vandar. Tom og vand, sipa meiri til djór enn t.d epli.

*s. 54 nr. 10*
"gevur eina allýsing av plantum": Er tarin eisini fevndur av hesi allýsing?

*s. 55 nr. 15*
" allýsir útseting av lívverum:" Tað eigur at verða munur á "útseting" og á at djórini sleppa út av óvart.

s. 55 *nr. 18*
"allýsir vistfrøðiligan stand": Óskiljandi hjá ikki fakpersóni. Eitt hugskot er, at fakorðini hava internationala heiti í klombrum eisini.

*s. 55 nr. 19*
"Vatnhúsarhald": Hvat skilst við vatnhúsarhald? Her manglar ein allýsing. Betur hevði verið við einum øðrum hugtaki, so ikki bland kemur við eitt húsarhald har fólk halda til.

*s. 59*
" Eisini (føroysk) sløg,sum valda skaða, eru í útgangsstøðinum fevnd av fyrisitingarmiðinum": Eisini laksalús, førlús, lundalús og aðrir sníkar og mús og rotta?

*s. 61 § 7*
"Ein avleiðing av § 6 kann tó vera. " : Eigur hetta at verða í partinum til § 6?

*s. 68*
"tøka av eggum": Føroyska heita er, at ræna egg. Tøka kann verða í klombrum.

Reyðslisti eigur at nágreinast í einari allýsing.

*s. 70 til § 16.*
Ryggdjór er meiri enn súgdjór og fuglur (sí sjálva greinina).

*s. 72*
"dýralæknafrøðilig": Betur hevði verið at brúkt heitið, djóralæknafrøðiligt ella veterinert. Hetta serliga, tá leitast skal eftir orðinum djóralækni. Tað eigur at verða samsvar millum heitini í øðrum lógum og kunngerðum

*s. 73 ovast*
"galda ikki fyri tøku eftir nr. 7": Einki nr.7 er í sjálvari lógini.

*s. 74*
Her mangla dømi, eitt dømi uppá raðfest slag kundi verið bleikjan.

*s. 81*
"Ll um djóravælferð áseta reglur fyri dýravælferð": Antin skal standa djóravælferð báðu ferð ella dýravælferð.

*s. 85 stk. 4, 1. pkt*
"Talan kann t.d. vera um at áseta ein hvítalista við plantum": Verða atlit tikin til moldina hjá plantunum fyri uppiíhangandi smáverum/kyktum?

*s. 86 niðast*
"Tað er ikki neyðugt, at vandi er fyri munandi óhepnum avleiðingum fyri tað lívfrøðiliga margfeldið um alt landið": Hetta er í andsøgn við, at ein meting skal verða gjørd eftir sjálvari greinini § 27 stk. 2, 2.pkt.

Vinarliga

Bergljott Ø. Midjord
Løgfrøðingur

Hildigunn Ellingsgaard
Løgfrøðingur

Oddjó Stovugarð
Embætisdjóralækni